## UTTAN ÚR HEIMI

### Biskupar finnast at Blair

Tveir bretskir biskupar finnast nú hvassliga at Tony Blair, forsætisráðharra, tí hann gjørdi av at fara í kríggj við Irak.

Erkabiskupurin í York, David Hope, sigur við blaðið The Times, at Blair vendi tað deyvað oyrað til, tá hann hóast stóra mótstøðu frá fólkinum gjørdi av, at Bretland skuldi taka lut í álopinum á Irak. Tom Wright, sum er biskupur í Durham, er eisini hvassorðaður. Hann sigur við blaðið, at Tony Blair og amerikanski forsetin, George W. Bush, hava hóreiggjað sær sum tveir, ið tóku heimsins lagnu í egnar hendur.

Tony Blair hevur verið fyri hvøssum atfinningum teir seinastu dagarnar. Beint fyri jól segði hann við BBC, at amerikanarar og bretar hava funnið fleiri prógv fyri, at Irak hevði hópoyðingarvápn, men sunnudagin vísti amerikanski umsitingarleiðarin í Irak, Paul Bremer, hesum aftur.

### Stórur hugur at leita

Áhugin millum útlendsk oljufeløg at leita eftir olju á norska landgrunninum hevur ongantíð verið so stórur sum í ár, skrivar Aftenposten.

Í 2002 komu fimm nýggj feløg inn á norska landgrunnin at leita eftir olju. Tað var tað sama sum í 2001. Í ár søktu tíggju nýggj feløg um leitiloyvi, og sjey teirra fingu játtandi svar. Tríggjar umsóknir eru ikki liðugt viðgjørdar enn. Feløgini, sum hava fingið loyvi í ár, eru Gaz de France, BG Group, Talisman, Andarko, Mærsk Olie, Revus Energy og Ruhrgas. Tey trý, sum ikki hava fingið svar enn, eru Oranje Nassau, Sumitomo og Acorn.

Einar Steensnæs, oljumálaráðharri, væntar, at uppaftur fleiri útlendsk feløg fara at bjóða seg fram á norsku oljuøkjunum. Hann væntar, at áhugin verður stórur, tá 18. útbjóðingarumfar verður. Har er talan um ikki færri enn 90 øki, og millum teirra eru nøkur í Norðsjónum, sum eru sera áhugaverd, sigur ráðharrin.

### Jólagávur fyri átta mia.

Julen varer længe, koster mange penge, siga danir, og tað seinna er í hvussu er staðfest í ár.

Sambært arbeiðsgevarafelagnum HTS brúktu danir ikki minni enn átta milliardir krónur til jólagávur í ár, og tað eru 16 prosent meiri enn í fjør. Búskaparfrøðingurin hjá HTS, Jørn Brendstrup, sigur við Jyllandspostin, at danir hava spart væl av pengum hetta seinasta árið, og tí hava teir hava ráð at keypa fleiri ella dýrari jólagávur í ár. Eisini heldur hann, at summi hava brúkt eitt sindur meiri enn vanligt, nú tey vita, at tey fáa ein ávísan skattalætta næsta ár. Men sambært búskaparfrøðinginum ávirkar hetta ikki bara jólahandilin, tí hann væntar, at tann privata nýtslan í Danmark verður størri næsta ár enn í ár.

Annars fekk ríkiskassin eisini sítt burtur úr tí góða jólahandlinum. Sambært HTS gav jólahandilin 6.000 arbeiðspláss, og ríkiskassin fekk 2,8 mia. krónur í skatti og avgjøldum.

### Heimsins størsta slanga

Í einari bygd á indonesisku oynni Java hava fólk fanga eina slangu, sum eftir øllum at døma er tann størsta, sum menn vita um. .

Talan er um eina pyton-slangu, og sambært tíðindastovuni AP er hon 14,85 metrar long og vigar 985 pund. Slangan er nú í einum búri í bygdini Curugsewu, og bæði ferðafólk og onnur hava longu leitað sær hagar at hyggja at henni. Pyton-slangan er annars tann longsta slangan í heiminum. Tað verður sagt, at hon kann eta ein seyð, og fleiri ferðir hevur hon eisini verið fólki at bana.

Sambært metbókini hjá Guinness átti ein slanga, sum varð skotin á indonesisku oynni Celebes í 1912, gamla metið. Hon var tíggju metrar long. Tyngsta slangan, sum menn vistu um frammanundan, var ein anakonda, sum varð skotin í Brasil í 1960. Hon vigaði 455 pund.

# Vápnaðir vaktarmenn umborð á flogførum

**Amerikonsku myndugleikarnir krevja, at útlendsk flogfeløg skulu hava vápnaðar vaktarmenn umborð á flogførunum í serligum førum.**


*Amerikanarar krevja, at øll flogfør, sum flúgva til og úr USA, skulu hava vápnaðar vaktarmenn umborð*

TRYGD
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanararnir ætla ikki, at tað, sum hendi tann 11. september í 2001, skal endurtaka seg, og tí hava teir nú sent fleiri útlendskum flogfeløgum krav um, at tey skulu hava vápnaðar vaktarmenn umborð á flogførunum, um umstøðurnar tala fyri tí.

Flogfeløgini fáa lítla og onga tíð til at umhugsa seg, tí skipanin skal koma í gildi beinanvegin, og hon umfatar øll flogfeløg, sum flúgva til og úr USA. Flutningsflogfør koma eisini undir skipanina.

Amerikonsku myndugleikarnir siga, at tað verður ikki neyðugt at hava vápnaðar vaktarmenn umborð altíð, men bert tá illgruni er um, at yvirgangsmenn ætla at søkja at málum í USA ella aðrastaðni.

Skandinaviska flogfelagið SAS hevur eisini fingið amerikanska kravið, og har hevur tað ikki fingið serliga góða móttøku. Talskvinnan hjá SAS, Siv Meisingset, sigur við norska útvarpið, at tað er ikki siðvenja at hava vápn umborð á flogførunum. Hon dugir tó ikki at siga, hvørjar avleiðingar amerikanska kravið kann fáa.

Sambært norska útvarpinum eru norsku loftferðslumyndugleikarnir heldur ikki fegnir um kravið úr USA.

Flogskiparar í fleiri londum hava fyrr víst aftur hugskotinum um at hava vápnaðar vaktarmenn umborð á ferðamannaflogførum.

# Krígsbrotsmenn valdir í tjóðartingið

**Hóast hann situr í Haag, ákærdur fyri krígsbrotsverk, er Slobodan Milosevic valdur í serbiska tjóðartingið. Hann er heldur ikki tann einasti.**


*Hóast hann er ákærdur fyri grov krígsbrotsverk, er Slobodan Milosevic valdur í serbiska tjóðartingið*

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tær mest víðgongdu kreftirnar á høgravonginum í Serbia vunnu tjóðartingsvalið um vikuskiftið. Flokkurin fekk eina millión atkvøður og 82 av teimum 250 tinglimunum og er sostatt størsti flokkur í landinum.

Millum tey valdu er fyrrverandi serbiski forsetin, Slobodan Milosevic, sum situr í Hagg, har hann er ákærdur fyri krígsbrotsverk og brotsverk ímóti mannaættini. Og hann er ikki tann einasti. Eitt annað valevni, sum eisini er valt í tingið, er Vojislav Seselj. Hann er eisini í Haag, tí hann er ákærdur fyri krígsbrotsverk, hópmorð og brotsverk ímóti mannaættini.

Teir báðir sleppa tó neyvan at seta fótin inn um tinggáttina í Beograd, men eygleiðarar siga, at valúrslitið er ein greiður boðskapur um, at tær víðgongdu tjóðskaparkreftirnar í Serbia hava góðan byrð í løtuni.

Einki bendir tó á, at tær koma í sjálva stjórnina.



# 2003


14. JANUAR: Jørgen Niclasen leggur frá sær sum landsstýrismaður, eftir at eitt søguligt misálit er um at verða samtykt í løgtinginum. Hann leggur frá sær, áðrenn løgtingið atkvøður, og tað sæst týðiliga, at hann er kroystur. Jacob Vestergaard verður seinni landsstýrismaður við fiskivinnumálum fyri Fólkaflokkin.


15. JANUAR: Axel Tórgarð, fyrrverandi prestur, fær »Heiðursløn landsins« fyri at týða heimsbókmentir til føroyskt. Samstundis fær Gunnar Hoydal, rithøvundur, mentanarvirðirsløn landsins.


15. FEBRUAR: Eivør Pálsdóttir luttekur í íslendska grand-prix'num við sanginum »Í nótt«. Hon stendur seg væl uttan at vinna, og leggur lunnar undir eina rimmar undirtøku sum sangari í Íslandi.